# ÁLIT
## UM YRKISSKEIÐ

MARS 2003

# Álit um yrkisskeið frá arbeiðsbólki, sum Mentamálaráðið setti í september mánaði 2002

**Handað Mentamálaráðnum í mars mánaði 2003**

# INNIHALD

## 1. táttur: Útgangsstøði


1.1 Samandráttur og niðustøða arbeiðsbólksins ………. 2

1.2 Hví yrkisskeið? ....…………………….....………….. 4

1.3 Lógargrundarlagið ……………………….………... 5

1.4 Tilnevning og arbeiðssetningur ……........………... 6


## 2. táttur: Útbúgvingarskipanin


2.1 Arbeiðið hjá bólkinum ……….…...…...….……….... 9

2.2 Tørvur á skeiðum og neyðug lóggáva …….……… 10

2.3 Hugtakið yrkisskeið ............................................. 13

2.4 Meginreglur um fígging ........................................ 14

2.5 Førleikatreytir …...…………………….…………... 14

2.6 Góðkenningarmyndugleiki og fyrisiting ………….. 15


## 3. táttur: Uppskot til lóg


3.1 Uppskot til lóg um yrkisskeið ……….….………… 17

3.2 Viðmerkingar til uppskotið ….……........….……… 21

# 1. TÁTTUR

## Útgangsstøði

1.1 Samandráttur og niðurstøða arbeiðsbólksins
1.2 Hví yrkisskeið?
1.3 Lógargrundarlagið
1.4 Tilnevning og arbeiðssetningur

## 1.1 Samandráttur og niðurstøða arbeiðsbólksins

Samandrátturin er gjørdur eftir niðurstøðunum, sum undirbólkarnir hvør sær eru komnir til. Eisini er samandrátturin gjørdur við støði í ynskjum og úttalilsum frá einstaklingum, stovnum og fyritøkum, og frá teimum umrøðum, sum arbeiðsbólkurin hevur havt á sínum fundum.

Við støði í hesum mælir arbeiðsbólkurin til, at:

**a)** fyri útbúgvingar/skeið á arbeiðsmarknaðinum, eigur ein lóggáva at verða gjørd um karmarnar fyri yrkisskeið, hvørs endamál m.a. skal verða:

- at menna førleikarnar hjá starvsfólkum í samsvari við krøvini á arbeiðsmarknaðinum,
- at útbúgva fólk til tey alsamt skiftandi førleikakrøvini á arbeiðsmarknaðinum, og
- at kunna fremja møguligar útbúgvingarætlanir fyri arbeiðsleys ella vinnutarnað.

**b)** sjálv yrkisskeiðini eftir hesi skipan verða fíggjað við luttøkugjaldi. Landskassin rindar útreiðslurnar til ta yvirskipaðu fyrisitingina av skipanini, meðan umsøkjari um góðkenning av yrkisskeiði rindar eitt umsitingargjald til at fíggja útreiðslurnar hjá yrkisnevndini.

**c)** skeiðini skulu haldast á góðkendum útbúgvingarstøðum.

**d)** yrkisskeið skulu eisini kunna takast í skeiðsrøðum og setast saman til styttri útbúgvingar, sum verða ásettar í kunngerðum.

**e)**
góðkenningin og eftirlitið við yrkisskeiðunum eigur at verða skipað í samsvari við ráðsskipanina smb. kap. 5 í yrkisútbúgvingarlógini og at verða fyrisitin av tí fyrisiting, sum frammanundan umsitur yrkisútbúgvingarnar.

Arbeiðsbólkurin hevur í arbeiði sínum lagt dent á, at uppskotið um eina skipan um yrkisskeið í størst møguligan mun er í samsvari við ynskini og tørvin hjá tí privatu vinnuni og almennu umsitingini.

*Arbeiðsbólkurin er samdur um at nýta heitið yrkisskeið um arbeiðsmarknaðarútbúgvingar. Heitið fevnir um bæði útbúgvingar og skeið, og er sprottið úr heitinum yrkisútbúgvingar, sum eru útbúgvingar úr tveimum upp til fimm ár (sí meira um hetta undir 2.3.)*

Arbeiðsbólkurin er av teirri meting, at hann í hesum áliti hevur lýst tey viðurskifti, sum honum varð álagt í tilnevningarskrivinum. Viðmerkjast skal, at ávís viðurskifti hava verið trupul at fáa staðfest, serliga við atliti at vinnu- og lestrarførleikunum uttanlands. Tó metir arbeiðsbólkurin, at skipanin, soleiðis sum hon er lýst í hesum áliti, lýkur tey krøv, sum sett eiga at verða slíkari útbúgvingarskipan.

*Tórshavn, í mars mánaði 2003*

______________________________
*Alfred Petersen, formaður*

| | |
|---|---|
| *Jan Mortensen* | *Poul Øregaard* |
| *Bjørgfríð Ludvig* | *Kristian Eli Brimsvík* |
| *Agnar Jensen* | *Margretha Rasmussen* |
| *Ingibjørg Berg* | *Súsanna Joensen* |
| *Elisabeth O. Gaardbo* | *Pætur Niclasen* |
| *Óli Hans Hammer Olsen* | *Hans Andr. Dam Joensen* |

## 1.2 Hví yrkisskeið?

Við sonevnda vitanarsamfelagnum verða støðugt krøv til útbúgving sett til arbeiðslív og annað virksemi, sum er partur av gerandisdegnum hjá hvørjum einstøkum. Henda veruleika mugu øll, ið varða av privatum eins og almennum arbeiðsplássum, fyrihalda seg til, og mugu vit bera saman við støðuna í teimum londum, vit bæði hava sum fyrimynd og sum kappingarneytar.

Nýggir framleiðsluhættir og nýggj framleiðsla sum heild liggja aftanfyri nógvar av teimum vørum og tænastum, sum eru á marknaðinum í dag. Førleikarnir hjá starvsfólkinum at laga seg til nýggjar umstøður verða umráðandi fortreytir fyri eini væl virkandi vinnu og framkomnum almennum stovnum komandi árini.

Talan verður bæði um serstakar fakligar førleikar og persónligar førleikar, eins og evni at umstilla seg í einum skjótt broytiligum samfelagi.

Tað er í hesum høpi, at ein skipan við yrkisskeiðum skal síggjast. Hesar útbúgvingar skulu nøkta tørvin hjá teimum, sum eru í starvi, umframt at geva arbeiðstøkum førleikar, sum kunnu fáa tey í vinnu.

Førleikamenning er neyðug í øllum aldrum. Eisini aftaná at ein hevur fingið sína skúlagongd, er støðugt tørvur á at læra seg nakað nýtt. Framvegis eru mong, ið ikki hava nakra útbúgving aftaná fólkaskúlan. Hesin bólkur kemur undir eitt vaksandi trýst at økja um sínar førleikar. Henda førleikamenning eigur í mest møguligan mun at verða samskipað í samstarvi millum leiðslur, starvsfólk og útbúgvingarverkið, til tess at fáa eina liðiliga loysn, sum er samantvinnað við verkligu upplæringina á arbeiðsplássinum, har hetta er hóskandi.

Fyri tey arbeiðstøku eru útbúgvingartilboð ein leið, sum Arbeiðsloysisskipanin sær møguleikar í.

Útbúgvingartilboð eiga eisini at verða fyri tey, sum eru í vanda fyri at missa arbeiði sítt, orsakað av ymsum umleggingum í vinnuni, og eiga tey tí at fáa møguleikar fyri umskúling.

Tað er umráðandi, at førleikamenningin verður lagað til dagliga arbeiðið, saman við teirri upplæring, sum fer fram har. Tað er tí neyðugt, at arbeiðspláss, útbúgvingarumsiting og útbúgvingarstøð samstarva.

Arbeiðsplássið má leggja neyðuga fyrireikandi støðið undir yrkisskeiðunum, so tey, sum taka lut í teimum, eru greið yvir, hvønn týdning tey hava. Harafturat eigur arbeiðsplássið at gera sær sína meting av, hvat fæst burtur úr útbúgvingini.

Tað er av stórum týdningi, at eftirútbúgvingarmøguleikarnir hava ein so fjøltáttaðan málbólk sum til ber, og at teir hóska til tann tørv, sum arbeiðsmarknaðurin hevur. Hesin tørvur er broytiligur, og tí mugu dagføringar gerast í innihaldinum, so hvørt sum hann kemur til sjóndar.

Fyri útbúgvingarstøðini verða yrkisskeiðini ein avbjóðing. Tey, sum undirvísa, mugu samantvinna sína undirvísing við arbeiðsroyndirnar hjá fólki, so at luttakararnir kunnu knýta sína nýggju vitan at dagliga arbeiðinum og nýta hana í verki.

## 1.3 Lógargrundarlagið

Í yrkisútbúgvingarlógini frá 1998 við seinni broytingum, er ásett í § 1, at landsstýrismanninum er heimilað at skipa fyri yrkisútbúgvingum **umframt arbeiðsmarknaðarútbúgvingum**. Tó hevur verið mett, at heimildin at skipa fyri arbeiðsmarknaðarútbúgvingum ikki hevur verið nøktandi, av tí at ongar aðrar ásetingar eru í nevndu lóg um arbeiðsmarknaðarútbúgvingar.

Í september mánaði 2001 setti Yrkisútbúgvingarráðið ein arbeiðsbólk at endurskoða yrkisútbúgvingarlógina. Eitt av tilmælunum í arbeiðssetninginum hjá arbeiðsbólkinum var orsakað av omanfyri nevndu viðurskiftum soljóðandi: *At arbeiðsmarknaðarútbúgvingar eisini verða tiknar við í nevndararbeiðið, t.v.s. at heitt verður á nevndina um at gera uppskot um neyðugar ásetingar í lógini um reglur hesum viðvíkjandi, herundir ásetingar um fíggingarviðurskifti o.a., um so er, at nevndin metir hetta verða møguligt/neyðugt.*

Nevndi arbeiðsbólkur lat Yrkisútbúgvingarráðnum sítt tilmæli í januar mánað 2002. Í sínum tilráðingum sigur arbeiðsbólkurin soleiðis um omanfyri nevnda spurning: *Viðvíkjandi tilmæli ráðsins, um eisini at taka spurningin um arbeiðsmarknaðarútbúgvingar við í nevndararbeiðið, mælir nevndin til, at yrkisútbúgvingarlógin ikki eigur at fevna um slíkar útbúgvingar, men at tað ístaðin verður sett nýggj nevnd til at gera uppskot um eina sjálvstøðuga lóg um arbeiðsmarknaðarútbúgvingar.*

Yrkisútbúgvingarráðið samtykti at taka nevnda tilmæli frá arbeiðsbólkinum til eftirtektar og at seta ein nýggjan arbeiðsbólk til at koma við uppskoti um lóg um arbeiðsmarknaðarútbúgvingar.

Í skrivi frá Yrkisútbúgvingarráðnum, dagfest 5. sept. 2002, verður soleiðis boðað frá: *Eftir at feløgini høvdu valt sínar limir, varð fundur hildin millum ráðsformannin og aðalstjóran í Mentamálaráðnum, og varð á tí fundinum semja um at heita á landsstýrismannin í undirvísingar- og mentamálum um at leggja ætlanina fyri á landsstýrisfundi, hetta til tess at tryggja politiska undirtøku fyri málinum.*

*Á landsstýrisfundinum varð full undirtøka fyri ætlanini, men varð m.a. ført fram, at eisini t.d. Fiskimálaráðið og Vinnumálaráðið áttu at fingið umboðan í arbeiðsbólkinum. Av hesi orsøk hevur Mentamálaráðið á fundi við ráðsformannin mælt til - av tí at talan er um eina ætlan, sum fleiri landsstýrisráð eru partar av – at arbeiðsbólkurin eigur at verða settur av Mentamálaráðnum og ikki av Yrkisútbúgvingarráðnum.*

## 1.4 Tilnevning og arbeiðssetningur

Í skrivi frá Mentamálaráðnum, dagfest 30. september 2002, verður boðað frá, at feløgini og landsstýrisráðini hava valt sínar limir í arbeiðsbólkin. Mentamálaráðið hevur tilnevnt formannin og skrivaran, sum ávikavist eru Alfred Petersen, advokatur og Petur Oluf Hansen, fyrisitingarleiðari.

Harumframt hava feløgini og ráðini valt hesar limir:
Bjørgfríð Ludvig vegna Føroya Handverksmeistarafelag
Poul Øregaard vegna Føroya Handverkarafelag
Jan Mortensen og Agnar Jensen vegna Føroya Arbeiðsgevarafelag
Margretha Rasmussen vegna Føroya Arbeiðarafelag
Súsanna Joensen vegna Starvsmannafelagið
Pætur Niclasen vegna S&K-felagið
Ingibjørg Berg vegna Løgmansskrivstovuna
Óli Hans Hammer Olsen vegna Fiskimálaráðið
Elisabeth O. Gaardbo vegna Vinnumálaráðið
Hans Andr. Dam Joensen vegna Mentamálaráðið

Seinni hevur Landsfelag Handverkarana valt Kristian Eli Brimsvík sum umboð fyri Landsfelagið.

Í skrivinum frá Mentamálaráðnum verður sagt, at uppgáva arbeiðsbólksins er:

**1.** at gera tilmæli um yrkisskeið (arbeiðsmarknaðarútbúgvingar), her í millum at tilevna uppskot til lóg um tílíkar útbúgvingar/skeið, hvørs endamál er,
   a) at hjálpa einstaklingum at nøkta grundleggjandi krøv til førleika í vinnuni,
   b) at viðlíkahalda og menna verandi vinnuførleika, og
   c) at menna og viðlíkahalda ástøðiligan vinnu- ella útbúgvingarførleika.

**2.** at hugsa yrkisskeið inn í *verandi útbúgvingarskipan og verandi útbúgvingarstovnar í Føroyum* (sí pkt. 5), tó so, at yrkisskeiðini eisini geva neyðugan førleika til arbeiði í øðrum londum. Eisini eigur bólkurin at meta um, hvussu ymsir partar, sum beinleiðis ella óbeinleiðis eru knýttir at arbeiðsmarknaðinum í Føroyum, so sum ALS, Almannastovan o.o., kunnu nýta nevndu skeiðstilboð, bæði til at menna grundleggjandi førleikar og í eftirútbúgvingarhøpi.

**3.** at útgreina, *hvørjar útbúgvingar ella hvørji skeið*, ið koma undir útbúgvingarøkið “arbeiðsmarknaðarútbúgvingar”. Somuleiðis eigur at verða útgreinað,
   a) hvør tørvurin á slíkum útbúgvingum er í ymsu vinnugreinunum,
   b) hvør tørvurin er á grundútbúgvingum á fólkaskúlastigi, og
   c) hvørjar førleikar ein útbúgving ella skeið skal geva við atliti at tí einstaka luttakaranum.

**4.** at gera metingar av,
a) hvussu útbúgvingarnar ella skeiðini kunnu *fíggjast*,
b) hvør *góðkennir* útbúgvingarnar ella skeiðini, og
c) hvussu *fyrisitingarligu viðurskiftini* kunnu skipast.

**5.** at miða móti einari *samanhangandi skipan*, soleiðis at skilja, at til ber at fullnýta verandi skúla- og útbúgvingarskipanir, umframt møguleikarnar fyri fjarlestri. Harumframt eigur at verða lýst, hvørjir bólkar koma undir skipanina, t.v.s. um talan er um fólk í arbeiði, arbeiðsleys, fólk við breki, yrkis- og/ella serarbeiðaralærd.

**6.** at síggja til, at uppskotið inniheldur *tær neyðugu ásetingarnar og heimildirnar* við atliti at tílíkum útbúgvingum, og at andsøgn ikki er til aðrar útbúgvingarlógir og -skipanir á økinum.

# 2. TÁTTUR

## Útbúgvingarskipanin

2.1 Arbeiðið hjá bólkinum
2.2 Tørvur á skeiðum og neyðug lóggáva
2.3 Hugtakið *Yrkisskeið*
2.4 Meginreglur um fígging
2.5 Førleikatreytir
2.6 Góðkenningarmyndugleiki og fyrisiting

## 2.1 Arbeiðið hjá bólkinum

Arbeiðsbólkurin hevur havt 8 fundir. Fyrsti fundur var hildin 9. oktober 2002 og tann seinasti 5. mars 2003. Millum fundirnar hava bólkar arbeitt við fylgjandi evnum:

a) Verandi útbúgvingartilboð á arbeiðsmarknaðinum og hvussu hesi eru skipað.

b) Metingar um, hvørjar útbúgvingar/skeið talan sum heild kann verða um, og hvørjar førleikar útbúgvingarnar/skeiðini skulu kunna geva.

c) Metingar um, hvussu útbúgvingarnar/skeiðini kunnu verða fíggjað, hvør skal góðkenna virksemið, og hvussu tey fyrisitingarligu viðurskiftini kunnu verða skipað.

d) Tilráðing um, hvørjir tættir eiga at verða partar av einum uppskoti til lóg um yrkisskeið (arbeiðsmarknaðarútbúgvingar).

Hvør bólkur sær hevur gjørt eina niðurstøðu av sínum arbeiði. Bólkur a) hevur sent spurnarbløð til virkir og stovnar, har m.a varð spurt, hvørjar útbúgvingar ella skeið finnast, hvussu hesi vera skipað, og hvør tørvurin er á slíkum útbúgvingum ella skeiðum. Úrslitið av hesum savnaða tilfarinum er sett upp í talvu 1 og 2 á bls. 11 og 12.

Eisini hava bólkarnir heitt á einstakar persónar, sum verða mettir at hava innlit í og vitan um arbeiðsmarknaðarviðurskifti, um at gera sínar metingar um tørvin á slíkum skeiðum/útbúgvingum og hvussu hetta eigur at verða skipað.

Ein av arbeiðssetningunum hjá arbeiðsbólkinum var at lýsa verandi útbúgvingartilboð á arbeiðsmarknaðinum og hvussu hesi eru skipað, og við støði í hesum at gera meting um tørvin á slíkum útbúgvingum ella skeiðum.

Arbeiðsbólkurin er av teirri áskoðan, og tað framgongur eisini av teimum kanningum, sum bólkurin hevur gjørt, at tørvur er á skipaðum karmum fyri útbúgvingum/skeiðum á arbeiðsmarknaðinum.

> *"Útbúgving er ikki longur ein avmarkað tíð á lívsleiðini hjá hvørjum einstøkum, men fevnir um alt lívið."*
>
> Brot úr løgmansrøðuni 2002

Á einum av fundunum hjá arbeiðsbólkinum hevði skeiðsleiðarin á sonevndu SAM-skeiðunum eina frágreiðing um skeiðini. Hesi skeiðini eru fyri fólki innan fiskivinnuna á landi og hildin á Tekniska skúla í Klaksvík.

Samanumtikið kann sigast, at arbeiðið hjá arbeiðsbólkinum hevur gingið væl, og eru limirnir í bólkinum samdir um niðurstøðurnar og tilmælini í hesum áliti.

Í 2.2 til 2.6 verður lýst, hvørjar meginreglur arbeiðsbólkurin metir hava týdning við atliti at slíkari skeiðsskipan.

## 2.2 Tørvur á skeiðum og neyðug lóggáva

Arbeiðsbólkurin heldur, at tað er neyðugt at hava skipaðar, almennar karmar, tá ræður um alment góðkent útbúgvingar- ella skeiðsvirksemi. Slíka skipan hava flest lond kring okkum, og er tá ofta talan um stórar og fjøltáttaðar skipanir.

Arbeiðsbólkurin heldur ikki, at ein so víðfevnd skipan eigur at verða sett á stovn hjá okkum. Vit eiga heldur at troyta ta skipan, vit longu hava, soleiðis at ein slík gerst so ódýr og liðilig sum til ber, og sum hartil er tilevnað tørvinum, sum hóskandi er til føroysk viðurskifti.

*”Útbúgvingarverkið eigur at vera ein natúrligur samstarvsfelagi hjá vinnulívinum, tá umrœður førleikan hjá tí einstaka, so fyritøkur støðugt kunnu vera kappingarførar, hvat dugnaligum starvsfólkum viðvíkur.”*

Brot úr ”Vinnusjónarmið 2002” hjá Vinnuhúsinum.

Í hesum sambandi verður mælt til at nýta ta skipanina, sum í dag er tengd at yrkisútbúgvingunum. Sí meira um hetta undir *góðkenning og fyrisiting* á bls. 15.

Sum áður nevnt, hevur arbeiðsbólkurin gjørt kanningar um verandi útbúgvingartilboð á arbeiðsmarknaðinum, og hvussu hesi eru skipað. Við støði í hesum kanningum er arbeiðsbólkurin komin eftir, at tørvur er á yrkisskeiðum, og at neyðugt er at fáa skipaðar karmar um slíkt virksemi.

Í kanningini vóru spurnabløð upprunaliga send út til uml. 130 virkir, stovnar, skúlar og feløg, har spurt varð um, hvørji útbúgvingartilboð finnast, og hvussu hesi eru skipað. 32 spurnabløð komu aftur.

*"Stór verklig vitan er ímillum fólk sum dagliga starvast í tí føroysku fiskivinnuni. Ein skipað útbúgving fyri hesi fólk kann styrkja vitanina og leggja servitan afturat. Harvið fáa vit ítøkilig úrslit burtur úr bæði fyri einstaklingar og vinnu”*

Føroya Ráfiskakeyparafelag
*(Egil Olsen, form.)"*

Arbeitt varð síðani við spurnabløðunum, partvís við teimum, sum vóru innkomin, og partvís við at ringja til tey, sum høvdu sent inn, til tess at fáa nágreiniligari upplýsingar. Eisini varð ringt til onnur, sum høvdu fingið spurnablaðið, og sum vóru hildin at verða útbjóðarar av skeið-

um, men sum ikki høvdu sent spurnablaðið innaftur. Burtur úr teimum spurnarbløðum, sum vóru innkomin, og teimum, sum ringt hevur verið til, eru 16 innsettt í talvu 1 niðanfyri.

Í førum, har virkir, stovnar, og feløg ikki eru tikin við í talvuna, er talan annaðhvørt um, at hesi einki útbúgvingartilboð hava ella at ávíst skeiðsvirksemi einans hevur verið fyri egnum starvsfólkum. Í innkomna tilfarinum sæst, at tað eru nógvar fyritøkur og nógvir stovnar, ið halda skeið, men eru ikki *útbjóðarar* av skeiðum.

Nevnast skal eisini skipanin av arbeiðsmarknaðarútbúgvingum í Danmørk - sonevndu AMU-skeiðini *(ArbejdsMarkedsUddannelser*), sum fleiri føroyingar luttaka á. Talan er um eftirútbúgvingarskeið fyri bæði yrkislærd og ikki yrkislærd.

Tey 16 í talvu 1, eru virkir og stovnar, sum umboða ein stóran part av teimum, sum bjóða út skeið. Talvan skuldi sostatt givið eina vegleiðandi mynd av tí skeiðsvirksemi, sum í dag finst á arbeiðsmarknaðinum.

Talva 1 vísir útbjóðarar og vinnuøki, sum skeiðini verða bjóðað út til. Frá tilfarinum, sum er komið aftur frá virkjum og stovnum og teimum, sum ringt hevur verið til, framgongur,

- at peningastovnar, tryggingarfeløg, teleútbjóðarar og onnur einans hava innanhýsis skeið fyri egnum starvsfólkum,
- at kostnaðurin fyri hvørt skeiðið liggur um kr. 1500,
- at flestu skeiðini eru úr tveimum í fimm dagar, og
- at luttakaratalið í miðal er um 20 til hvørt skeið.

Talvan vísir, til hvønn vinnubólk, tað einstaka virkið ella stovnurin bjóðar út skeið. Hinvegin sæst ikki, hvussu mong skeiðini eru, sum virkið ella stovnurin hevur havt innan teir ávísu vinnubólkarnar.

*Talva 1*

| | Skrivstova | Byggivinna | Farma- og fólka-flutningur | Fiskivinna | Sjófólk | Alivinna | Landbúnað | Oljuvinna | Sjúkrarøkt | Leiðsla og persónlig menning | Telduskeið | Eftirlit og trygd | Málslig skeið |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Skeið í ávísum vinnubólkum | | | | | | | | | Tvørtur um vinnubólkar | | | |
| Arbeiðseftirlitið | | | | | | | | | | | | ■ | |
| Brandskúlin | | | | ■ | ■ | ■ | | | ■ | | | ■ | |
| Fiskivinnuskúlin | | | ■ | ■ | ■ | ■ | | | | | | | |
| Fróðskaparsetrið | | | | | | | | | | | | | ■ |
| Føroya Sjómansskúli | | | ■ | | ■ | | | | | | | | |
| Klaksvíkar Sjómansskúli | | | | | ■ | | | | | | | | |
| Kvasir | ■ | | | | | | | | | | | | |
| Lærarskúlin | | | | | | | | | ■ | | | | |
| Løgmansskrivstovan | ■ | | | | | | | | | | | | |
| Maskinmeistaraskúlin | | ■ | | | ■ | | | | | | ■ | | |
| Sjúkrarøktarfrøðingarskúlin | | | | | | | | | ■ | | | | |
| Skeiðsdepilin við Marknagil | ■ | | | | | | | | ■ | ■ | ■ | | ■ |
| Tekniski skúlin í Klaksvík | ■ | | | ■ | ■ | | | | | | ■ | | |
| TK-Stovan | | ■ | | ■ | | ■ | | ■ | | ■ | | | |
| Tórshavnar kvøldskúli | | | | | ■ | | ■ | | | | | | |
| Trygdarmiðstøðin | | | ■ | | ■ | ■ | | | | | | | |

Í talvu 2 niðanfyri er frá innkomna tilfarinum gjørt eitt býti millum sløgini av skeiðum, sum hava verið hildin í 2002. Av talvuni sæst, at flestu skeiðini eru innan KT-økið, meðan skeið, sum koma undir "Ymiskt", t.d. skrivstova, byggivinna, farma- og fólkaflutningur, alivinna, landbúnaður, oljuvinna og eftirlit og trygd, er næststørsta økið. Harnæst kemur bólkurin "Leiðsla og persónlig menning".

Í bólkinum "Sjófólk" er talan um trygdarskeið, dugnaskaparroynd í sigling og motorlæru, maritim fyrireiking o.l.

Í bólkinum "Fiskivinna", sum er tað minsta økið, er talan í høvuðsheitum um skeið fyri ábyrgdarfólkum. SAM-skeiðini á Tekniska Skúlanum í Klakvík hava tó verið hildin fyri starvsfólkum á fiskavirkjum í Norðuroyggjum, herundir eisini arbeiðsfólkunum.

*Talva 2.*



## 2.3 Hugtakið Yrkisskeið

Arbeiðsbólkurin er samdur um at nýta heitið *yrkisskeið* um arbeiðsmarknaðarútbúgvingar. Heitið fevnir um bæði útbúgvingar og skeið, og er sprottið úr heitinum *yrkis*útbúgvingar, sum eru útbúgvingar úr tveimum upp til fimm ár.

Yrkis*skeið* eru mótvegis yrkis*útbúgvingum* styttri útbúgvingar ella skeið. Talan kann somuleiðis verða um at seta skeiðsrøðir saman til eina útbúgving. Hildið verður, at heitið hóskar væl, eisini um talan er um at hava somu ráðsskipan, sum er tengd at yrkisútbúgvingunum sambært kapittul 5 í yrkisútbúgvingarlógini.

Við yrkisskeiðum kann talan verða um t.d. førleikamennandi skeið fyri fólkum í vinnu, eftirútbúgving fyri avlærd og skeið fyri arbeiðsleys og vinnutarnað, sum annaðhvørt kunnu verða kravd ella sjálvboðin. Hesi skeið venda sær til arbeiðarar og serarbeiðarar, starvsfólk við yrkisútbúgving, fólki við tøkningaútbúgving og aðrar javnsettar bólkar.

Útflutningsmarknaðurin fer at seta krøv um ávíst vitanarstøði, eins og innaneftirlitskrøvini verða herd í samsvari við eitt nú ISO 9000-normarnar. Hetta skundar undir hvørt einstakt virki at geva sínum starvsfólkum neyðuga (eftir)útbúgving.

Yrkisskeiðini eiga eisini at kunna takast í kubbum og verða sett saman til eina ***útbúgving***, ið skal síggjast í einum felags høpi við avvarðandi yrkisútbúgving. Samansett skeið kunnu í vavi svara til eina serarbeiðaraútbúgving. Talan kann møguliga verða um eitt minstatímatal.

Sum dømi kann nevnast merkonomútbúgvingin, sum er ein útbúgving, sett saman av 6 styttri skeiðum (lærugreinum) á 45 undirvísingartímar umframt einari serlærugrein við einari verkætlan á 90 undirvísingartímar.

Yrkisskeiðini eiga eisini í ávísan mun at veita avriksflutning (merit), tá ið talan er um útbúgvingar á miðnámsstigi, og harvið eisini at geva førleika til upptøku til framhaldandi útbúgving á t.d. tøkningastigi.

> *"Toll- og Skattstovan metir, at tað er stórur tørvur á arbeiðsmarknaðarútbúgvingum.*
>
> *Tær vilja jú eisini vera við til at betra um almennu fyrisitingina í síni heild"*
>
> Toll– og Skattstova Føroya
> *(Maud Poulsen, samskiftisfólk)*

Við eftirbúgving verður eisini hugsað um fólk, sum av einari ella aðrari orsøk ikki kunna røkja tað starv, tey hava útbúgving til, men sum við einum ella fleiri yrkisskeiðum kunnu fáa tann neyðuga førleikan til at røkja annað starv.

Møguleiki eigur eisini at verið fyri, at fólk, ið eru arbeiðsleys ella sum av eini hvørji orsøk eru vinnutarnað, tað

verið seg av vanlukku ella sjúku, kunnu taka yrkisskeið, soleiðis at tey kunnu gerast virkin á arbeiðsmarknaðinum.

Yrkisskeiðini eiga eisini at kunna verða boðin út sum almennandi skeið á grundstigi, so sum førleikar, ið svara til fráfaringarroynd fólkaskúlans ella grundleggjandi nýggjar førleikar, eitt nú innan kunningartøkni og fremmandamál.

## 2.4 Meginreglur um fígging

Útreiðslurnar til yrkisskeiðini verða fíggjaðar við luttøkugjaldi. Luttøkugjaldari kann verða arbeiðspláss, fakfelag, landskassi, einstaklingur, Arbeiðsloysisskipanin, Almannastovan og onnur líknandi.

Arbeiðsbólkurin metir, at við luttøkugjaldi verður tryggjað, at skeið, sum vinnuni tørvar, verða boðin út. Við øðrum orðum verður hildið rættast, at marknaðarkrefturnar stýra slíkum viðurskiftum.

Landskassin kann veita stuðul til tey yrkisskeið, ið eru beinleiðis partur av eini styttri yrkisrættaðari útbúgving, eitt nú á merkonomstigi. Sum áður nevnt verður mælt til, at ráðsskipanin við atliti at yrkisútbúgvingunum verður nýtt í sambandi við yrkisskeiðini. Roknast má tó við, at hetta fer at ávirka rakstrarjáttanina hjá hesi skipan.

Til at fíggja útreiðslurnar hjá fyrisitingini, verður mælt til, at tann, sum søkir um at fáa yrkisskeið góðkent, rindar eitt umsitingargjald eftir gjøllari, av landsstýrismanninum, ásettum reglum til at fíggja útreiðslurnar av yrkisnevndaarbeiðnum, meðan landskassin rindar útreiðslurnar hjá Yrkisútbúgvingarráðnum.

## 2.5 Førleikatreytir

Hildið verður, at einstøku yrkisskeiðini kunnu liggja bæði á útbúgvingarstøðum og á arbeiðsplássum.
At mælt verður til, at skeið eisini kunnu liggja á arbeiðsplássum kemst av, at hetta kann verða bæði fíggjarliga skilagott og hugburðsmennandi fyri eitt arbeiðspláss.

Skeiðini eiga í slíkum førum at verða samskipað millum útbúgvingarstað og arbeiðspláss

> *" Tað sum vantar er, at øll, ið arbeiða innan fiskivinnuna á landi skulu hava møguleika, í hvussu so er tilboð, um at kunna skúla seg við at fara á skeið. Eg meini, at tað er í okkara høvuðsvinnu, at vit eiga at byrja við serútbúgving fyri vanliga verkafólkið."*
>
> Føroya Arbeiðarafelag
> *(Ingeborg Vinther, form.)*

við t.d., at ein verkligur partur fer fram á einum arbeiðsplássi, meðan tann meira ástøðiligi parturin fer fram á einum útbúgvingarstaði. Útbúgvingarstað kann eisini vera eitt arbeiðspláss.

Annaðhvørt talan er um at halda skeið á einum útbúgvingarstaði ella á einum arbeiðsplássi, er neyðugt at hava eina góðkenningarskipan, sum tryggjar tann neyðuga førleikan hjá skeiðshaldaranum í sambandi við undirvísing, útbúnað o.l.

Mælt verður til, at førleikakrøvini til undirvísarar sum meginregla eiga at verða á sama støði sum tey fakligu førleikakrøvini, ið eru galdandi á yrkisútbúgvingarøkinum. Tó skal góðkenningarmyndugleikin - sí niðanfyri um *góðkenning og fyrisiting* – í serligum føri um neyðugt kunna gera frávik í meginreglunum.

## 2.6 Góðkenningarmyndugleiki og fyrisiting

Sum áður nevnt heldur arbeiðsbólkurin tað hava týdning, at skipanin við yrkisskeiðum er soleiðis, at hon gerst ódýr og liðilig, og at hon troytir ta skipan, sum longu finst, og sum Yrkisdepilin í Mentamálaráðnum umsitur.

*"Økt kapping á heimsmarknaðinum, meira mekanisering, størri fjølbroytni í vøruútboði og krøv til tann einstaka um at loysa nýggjar arbeiðsuppgávur, eru alt viðurskifti, sum gera tað áhaldandi neyðugt at menna kunnleikastigið hjá arbeiðsmegini.*

*Gloyma vit hetta, kann tað koma at kosta okkum dýrt í kappingini á heimsmarknaðinum".*

Fiskivinnuskúlin
*(Jákup Andreasen, skúlastjóri)*

Í hesum sambandi verður mælt til, at skipanin við yrkisskeiðum og skipanin við yrkisútbúgvingum virka innan ein felags karm. Hetta merkir, at góðkenning og fyrisiting av yrkisskeiðunum verður skipað eftir somu reglum, sum eru galdandi fyri yrkisútbúgvingarnar samsvarandi kap. 5 í yrkisútbúgvingarlógini.

Samsvarandi hesi lóg er eitt *Yrkisútbúgvingarráð*, sum ger tilmæli til landsstýrismannin um tey yvirskipaðu viðurskiftini við atliti at yrkisútbúgvingum, og *yrkisnevndir,* sum við síni fakligu vitan og førleika viðgera og tilmæla tey einstøku yrkisskeiðini.

# 3. TÁTTUR

## Lógaruppskot

3.1. Uppskot til lóg um yrkisskeið
3.2. Viðmerkingar til lógaruppskotið

## 3.1 Uppskot til lóg um yrkisskeið

Samsvarandi samtykt Føroya løgtings staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

### Kapittul 1
***Stevnumið og skipan***

**§ 1.** Landsstýrismanninum verður heimilað at skipa neyðugar karmar fyri yrkisskeiðum og hava eftirlit við hesum.

**§ 2.** Yrkisskeiðini hava til endamáls:

a) at hjálpa einstaklingum at nøkta grundleggjandi krøv til førleika í vinnuni,
b) at viðlíkahalda og menna verandi vinnuførleika, og
c) at menna og viðlíkahalda ástøðiligan vinnu- ella útbúgvingarførleika.

**§ 3.** Landsstýrismaðurin í mentamálum er fyrisitingarligur myndugleiki fyri yrkisskeiðunum og ásetir yvirskipaðu reglurnar fyri skeiðini.
*Stk. 2.* Yrkisútbúgvingarráðið og yrkisnevndirnar, ið eru skipaðar sambært kap. 5 í løgtingslóg nr. 94 frá 29. desember 1998 um yrkisútbúgvingar við seinni broytingum, virka við atliti at yrkisskeiðunum sambært ásetingunum í § 9.

### Kapittul 2
***Innihaldið***

**§ 4.** Yrkisskeiðini fevna um:

1) skeið, sum menna vinnuførleikarnar hjá tí einstaka luttakaranum,
2) skeið, sum bøta um møguleikarnar hjá tí einstaka luttakaranum at fáa útbúgving ella arbeiði.

**§ 5.** Yrkisskeiðini venda sær til:

1) arbeiðarar og serarbeiðarar,
2) starvsfólk við yrkisútbúgving,
3) fólk við tøkningaútbúgving, og
4) aðrar bólkar, ið kunnu javnsetast við 1), 2) og 3).

**§ 6.** Yrkisskeiðini verða skipað í eindum, eftir teimum fortreytum, sum luttakararnir hava, og eiga, har hetta ber til, innihaldsliga at verða knýtt at verandi yrkisútbúgvingum, soleiðis at tey fevna um somu tættir, sum eru í yrkislærugreinunum.

*Stk. 2.* Yrkisskeið kunnu takast í skeiðsrøðum og setast saman til styttri yrkisrættaðar útbúgvingar.
*Stk. 3.* Skeið við einum almennandi innihaldi kunnu verða hildin sambært hesi lóg, um endamálið er at útinna stevnumiðini hjá útbúgvingunum, sbr. § 2.
*Stk. 4.* Í reglunum fyri hvørt góðkent yrkisskeið skal verða ásett, um próvtøka verður hildin, og hvørjar fremjingarreglur tá eru galdandi.
*Stk. 5.* Fyri yrkisskeið, sum ikki enda við próvtøku, skal útbúgvingarstaðið geva luttakarum skeiðsváttan samsvarandi reglum, sum landsstýrismaðurin ásetir eftir tilmæli frá Yrkisútbúgvingarráðnum.
*Stk. 6.* Góðkenning av einstaka skeiðnum eigur í mest møguligan mun at tryggja, at tey kunnu avriksflytast til aðrar útbúgvingar.

## Kapittul 3
### *Góðkenningarmyndugleiki*

**§ 7.** Yrkisnevndin fyri avvarðandi yrkisskeið viðger og ger tilmæli um tey ávísu skeiðini, samanber § 9.
*Stk. 2.* Yrkisútbúgvingarráðið góðkennir tey yrkisskeið, sum avvarðandi yrkisnevnd hevur tilmælt, samanber § 9, og kunnger avvarðandi myndugleikum og vinnu um góðkenningina og samtyktu skeiðsreglurnar.
*Stk. 3.* Er talan um samanhangandi skeið, sum enda við ávísari styttri yrkisrættaðari útbúgving, smb. § 6, stk. 2, ásetir landsstýrismaðurin reglurnar fyri útbúgvingina eftir tilmæli frá Yrkisútbúgvingarráðnum.

**§ 8.** Yrkisskeiðini fara fram á útbúgvingarstøðum, sum avvarðandi yrkisnevnd hevur góðkent.
*Stk. 2.* Við góðkenningini skal verða tryggjað, at útbúgvingarstaðið hevur tann neyðuga førleikan til at halda góðkent skeið.
*Stk. 3.* Leiðarin fyri útbúgvingarstaðið hevur mótvegis landsstýrismanninum ábyrgdina av undirvísingini og møguligum próvtøkum, um hetta er ásett í reglunum fyri tað einstaka skeiðið, og at skriva út skeiðsváttan.

## Kapittul 4
### *Fyriskipan og fyrisiting*

**§ 9.** Yrkisútbúgvingarráðið ger tilmæli til landsstýrismannin um yvirskipað viðurskifti við atliti at yrkisskeiðunum, her í millum at neyvari reglur verða lýstar í kunngerð.
*Stk. 2.* Yrkisútbúgvingarráðið ger av, hvørji yrkisskeið koma undir skipanina eftir hesi lóg, og í hvønn mun einstøk skeið og/ella samanhangandi skeið kunnu geva avriksflutning eftir gjøllari, av Yrkisútbúgvingarráðnum, ásettum reglum.

*Stk. 3.* Til tess at tryggja, at yrkisskeiðini lúka almenn og faklig krøv, ger yrkisnevndin, sum frammanundan er tilnevnd av Yrkisútbúgvingarráðnum til ávísa útbúgving, ráðnum tilmæli um góðkenning av ávísum yrkisskeiði.

*Stk. 4.* Um eingin yrkisnevnd frammanundan er tilnevnd, sbr. stk. 3, skal Yrkisútbúgvingarráðið tilnevna 2 fastar limir í eina yrkisnevnd, umboðandi ávikavist arbeiðsgevarar og løntakarar. Afturat føstu limunum, skal avvarðandi arbeiðsgevarafeløg velja 1 lim og avvarðandi løntakarafelag 1 lim í nevndina.

*Stk. 5.* Yrkisnevndin skal í síni viðgerð tryggja, at góðkend yrkisskeið í mest møguligan mun eru samskipað við yrkis- og miðnámsútbúgvingarnar, soleiðis at til ber hjá tí einstaka skeiðsluttakaranum at taka útbúgving sína innan ein felags karm.

*Stk. 6.* Yrkisnevndafyrisitingin skrivar út prógv, tá ið skeið verða sett saman til eina útbúgving sbrt. § 6, stk. 2, eftir reglum, sum landsstýrismaðurin ásetir, sbr. stk. 1.

## Kapittul 5
***Fígging***

**§ 10.** Yrkisskeiðini verða fíggjað við luttøkugjaldi.

*Stk. 2.* Landskassin rindar útreiðslurnar hjá Yrkisútbúgvingarráðnum, sbr. § 3, stk. 2.

*Stk. 3.* Tann, sum søkir um góðkenning av yrkisskeiði, rindar eitt umsitingargjald til landskassan til at fíggja útreiðslurnar hjá yrkisnevndunum, sbr. § 3, stk. 2.

*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin ásetir eftir tilmæli frá Yrkisútbúgvingarráðnum gjøllari reglur um upphæddina av umsitingargjaldinum, og hvussu gjaldið verður umsitið, sbr. § 9, stk. 1.

*Stk. 5.* Landskassin kann veita stuðul til tey yrkisskeið, ið eru beinleiðis partur av eini styttri yrkisrættaðari útbúgving sbrt. § 5, nr. 2), 3) og 4), eitt nú á merkonomstigi.

## Kapittul 6
***Aðrar ásetingar***

**§ 11.** Kæra um avgerð, sum leiðarin fyri útbúgvingarstaðið tekur í námsfrøðiligum málum, og kæra um avgerðir tiknar í sambandi við próvtøku, kunnu í seinasta lagi 7 dagar eftir, at avgerð er kunngjørd luttakarunum, leggjast fyri landsstýrismannin eftir reglum, ið verða ásettar av landsstýrismanninum, samanber § 9, stk. 1.

*Stk. 2.* Kæra um avgerð hjá yrkisnevnd, um ikki at góðkenna yrkisskeið ella útbúgvingarstað, samanber § 7, stk. 1 og § 8, stk. 1, kann í seinasta lagi 4 vikur eftir, at umsøkjarin er kunnaður um avgerðina, latast kærunevndini viðvíkjandi góðkenning av læruplássum sambært lógini um yrkisútbúgvingar.

**§12.** Tær einstøku skeiðsreglurnar skulu áseta, um luttakarar hava møtiskyldu og skyldu at lata inn møgulig kravd avrik.

**§ 13.** Útbúgvingarstaðið hevur ábyrgdina av, at skeiðsluttakarar eru tryggjaðir móti skaða, sum teimum kann verða fyri undir undirvísingini og møguligum starvsroyndum.

## Kapittul 7
***Gildiskoma***

**§ 14.** Henda lóg kemur í gildi 1. januar 2004.

## 3.2 Viðmerkingar til lógaruppskotið

### Almennar viðmerkingar:

Endamálið við einari lóggávu á økinum er at fáa skipaðar karmar fyri yrkisskeið, sum skulu menna førleikarnar hjá starvsfólkum í vinnu, umframt at skapa øðrum, so sum arbeiðsleysum og vinnutarnaðum, møguleikar at ogna sær neyðugar fakligar og persónligar førleikar.

Tílíkir skipaðir karmar vera hildnir verða neyðugir í einum samfelagi, har størri og størri krøv verða sett, bæði við atliti at verandi arbeiðsmarknaðarviðurskiftum og teimum broytiligu viðurskiftunum, sum eyðkenna eitt framkomið tøkniligt samfelag, har einki stendur í stað, men alsamt broytist frá degi til dags.

Roknast má tí við, at førleikarnir hjá starvsfólkinum at laga seg til nýggjar umstøður fara at gerast ein umráðandi fortreyt fyri eini væl virkandi vinnu og framkomnum almennum stovnum komandi árini. Talan verður bæði um serstakar fakligar førleikar og persónligar førleikar, eins og evni at umstilla seg í einum skjótt broytiligum samfelagi.

Tað verður hildið at vera sera týdningarmikið, tá talan er um førleikamennandi skeið, at slík hava eina lóggávu, sum tryggjar teir neyðugu karmarnar fyri slíkt virksemi, umframt at neyðug og galdandi førleikakrøv tryggja, at virksemið fer fram á einum fullgóðum og tilsvarandi høgum stigi.

Tað, sum sermerkir hesa skipan er, at tað er vinnan, sum í stóran mun skipar fyri skeiðunum/útbúgvingunum. Tað er eisini vinnan sjálv, sum í høvuðsheitum rindar útreiðslurnar til menningina av skeiðunum og útreiðslurnar til undirvísingina.

Landskassans partur av útreiðslunum við atliti at skipanini snýr seg fyri ein part um stuðul til ávísar styttri yrkisrættaðar útbúgvingar, eitt nú á merkonomstigi. Í øðrum lagi rindar landskassin útreiðslurnar hjá Yrkisútbúgvingarráðnum. Tó skal viðmerkjast, at eisini her skal tann privata vinnan ella almenna umsitingin rinda eina ávísa upphædd – eitt umsitingargjald – til útreiðslurnar hjá yrkisnevndunum.

Lógaruppskotið hevur, sum sæst av tilnevningini av arbeiðsbólkinum, verið viðgjørt og samtykt av nógvum avvarðandi pørtum á arbeiðsmarknaðinum umframt umboðum fyri fleiri aðalráð. Somuleiðis er tað latið Yrkisútbúgvingarráðnum til kunningar og viðmerkingar.

## Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

*Til § 1:*
Við yrkisskeiðum verður hugsað um útbúgvingar og skeið fyri starvsfólk í privatu vinnuni og almennu umsitingini. Undantikið lógum á t.d. forsorgarøkinum er eingin lóggáva um slíkt útbúgvingarvirksemi.

Tað verður hildið at vera sera týdningarmikið, tá ið talan er um førleikamennandi skeið, at tey hava eina lóggávu, sum kann tryggja teir neyðugu karmarnar fyri slíkum virksemi, umframt at neyðug og galdandi førleikakrøv skulu tryggja, at virksemið fer fram á einum fullgóðum og nóg høgum støði.

*Til § 2:*
Endamálið við skeiðunum er at menna neyðugar førleikar, bæði hjá teimum, sum frammanundan hava eina útbúgving, men eisini hjá teimum, sum onga útbúgving hava ella sum t.d. eru arbeiðsleys ella vinnutarnað. Talan kann verða um skeið, sum geva fakliga ella persónliga menning og almennandi førleika.

*Til § 3:*
Verandi ráðsskipan, sambært ásetingunum í kap. 5 í lógini um yrkisútbúgvingar við atliti at yrkisútbúgvingunum, er í høvuðsheitum eisini galdandi við atliti at skipanini við yrkisskeiðum. Tá talan er um fyrisitingina av yrkisskeiðum, verður hugsað um somu fyrisiting, sum umsitur verandi yrkisútbúgvingar.

*Til §§ 4 og 5:*
Talan er fyrst og fremst um at gera neyðugar karmar, sum skulu skapa grundarlag fyri førleikamenningini hjá fólki í vinnu. Eisini er lógin ætlað sum karmur um styttri yrkisrættaðar útbúgvingar, so sum merkonomútbúgvingin, sum er sett saman av fleiri styttri skeiðum (lærugreinum). Hugsast kann eisini um skeiðsvirksemi, sum eitt fakligt ella ástøðiligt ískoyti til eina støðisútbúgving (FHS, SIF ella SIT). Harumframt er lógarkarmurin eisini grundarlag undir skeiðs- ella útbúgvingarvirksemi hjá teimum, sum annaðhvørt eru uttan arbeiði ella sum av eini hvørjari orsøk eru vinnutarnað.

Lógin avmarkar seg tó til ávísar bólkar, tá tað snýr seg um skeið ella útbúgvingar, sum skulu veita vinnuførleika. Hetta, fyri ikki at koma inn á øki, sum hava serstakar lógir og skipanir, so sum forsorgarøkið og heilsuøkið.

*Til § 6:*
Endamálið við yrkisskeiðunum er at skapa fortreytirnar fyri førleikamenning. Tí eiga skeiðini at verða skipað eftir fortreytunum hjá teimum

luttakandi, soleiðis at sum mest fæst burtur úr. Talan kann verða um at skipa skeiðini í hóskandi eindir, alt eftir fakligu ella persónligu eginleikunum og fortreytunum hjá teimum, sum søkja um at verða tikin upp til skeiðini.

Er talan um at menna ein fakligan førleika, eigur innihaldið í frálæruni, í tann mun tað ber til, at hava somu tættir, sum eru í yrkisútbúgvingunum. Hetta fyri at gera tað møguligt at nýta ta undirvísingarskipan, sum longu finst, so tann luttakandi seinni í mest møguligan mun kann fáa góðskrivað fingnu frálæruna í einari møguligari yrkisútbúgving.

Við samansett yrkisskeið kann talan verða um styttri yrkisrættaðar útbúgvingar, sum í vavi svara til eina serarbeiðaraútbúgving.

*Til §§ 7 og 8:*
Eins og við skipanini við yrkisútbúgvingum, skal yrkisnevndin viðgera og tilmæla innihaldið í yrkisskeiðunum. Á sama hátt skal Yrkisútbúgvingarráðið eftir lógini um yrkisútbúgvingar verða góðkenningarmyndugleiki, tá ið talan er um skipanina um yrkisskeið.

Við at nýta somu ráðsskipan, sum er galdandi í skipanini fyri yrkisútbúgvingar, fæst størri gagnnýtsla av tí fakligu vitanini og tí samanseting, sum Yrkisútbúgvingarráðið og yrkisnevndirnar og tann avvarðandi fyrisitingin hevur.

Góðkenningin av útbúgvingarstøðum verður gjørd av yrkisnevndini, eins og tá ið talan er um læruplássgóðkenning. Yrkisnevndin skal tryggja, at yrkisskeiðini hava tær neyðugu og kravdu fortreytirnar eftir ávísum skipaðum reglum.

*Til § 9:*
Somu yrkisnevndirnar, sum eru tilnevndar av Yrkisútbúgvingarráðnum, virka eisini við atliti at skipanini um yrkisskeið. Um so er, at eingin yrkisnevnd hevur førleika at meta um eitt yrkisskeið, sum t.d. kann verða sett saman av fleiri og ymiskum verkligum og ástøðiligum pørtum, tilnevnir Yrkisútbúgvingarráðið eina serliga yrkisnevnd við 2 føstum limum. Aftrat føstu limunum verða tilnevndir 2 limir eftir tilmæli frá ávikavist avvarðandi arbeiðsgevarafelag og avvarðandi løntakarafelag, og sum í mest møguligan mun hava ein fakligan førleika við atliti at tí ávísa yrkisskeiðinum.

Á sama hátt sum við ráðsskipanini, er eisini talan um somu fyrisiting við atliti at yrkisskeiðunum. T.v.s., at tann fyrisiting, sum hevur umsitingina av yrkisútbúgvingarskipanini, eisini umsitur yrkisskeiðsskipanina. Hesa fyrisiting hevur Yrkisdepilin í Mentamálaráðnum.

Eins og við ráðsskipanini og fyrisitingini av yrkisskeiðunum, fylgja skeiðini í høvuðsheitum teimum reglum, sum eru galdandi á yrkisútbúgv-

ingarøkinum. Í einari kunngerð (høvuðskunngerð), samanber § 9, stk. 1, verða tó ásettar neyvari reglur fyri yrkisskeiðini.

*Til § 10:*
Útbjóðari av einum skeiði skal fíggja allar útreiðslurnar við luttøkugjaldi. Luttøkugjaldari kann verða arbeiðspláss, yrkis- ella fakfelag, landskassin, einstaklingur, Arbeiðsloysisskipanin, Almannastovan o.o.

Landskassin ber útreiðslurnar av arbeiðnum hjá Yrkisútbúgvingarráðnum, meðan tann, sum søkir um skeiðsgóðkenning rindar eitt sonevnt umsitingargjald av útreiðslunum av arbeiðnum hjá yrkisnevndini.

Landskassin kann veita stuðul til serligar tilrættarlagdar útbúgvingarætlanir og styttri yrkisrættaðar útbúgvingar.

*Til §§ 11 og 12:*
Luttakari kann kæra avgerðir, sum tann, ið hevur ábyrgdina av einum yrkisskeiði hevur tikið, til landstýrismannin.

Um umsókn um at fáa yrkisskeið ella útbúgvingarstað góðkent verður havnað, kann umsøkjarin ella útbúgvingarstaðið kæra avgerðina til kærunevndina viðvíkjandi góðkenning av læruplássum, sum er sett við atliti at yrkisútbúgvingum. Kærunevndin er evsti kærumyndugleiki.

*Til § 13:*
Útbúgvingarstaðið hevur ábyrgdina av, at skeiðsluttakarar eru tryggjaðir móti skaðum, sum teimum kunnu verða fyri í undirvísingini. Hetta merkir, at um so er, at luttakari ikki er tryggjaður móti møguligum skaðum, skal útbúgvingarstaðið syrgja fyri, at luttakari verður tryggjaður.

*Til § 14:*
Mælt verður til, at lógin verður sett í gildi 1. januar 2004.

---

**Álit um yrkiskeið frá arbeiðsbólki, ið Mentamálaráðið setti í september mánað 2002 og sum er handað Mentamálaráðnum í mars mánaði 2003**

*Margfaldað og innbundið hevur Yrkisdepilin*